UTTAN ÚR HEIMI

# Hevði ov nógv fólk umborð



*Bjargingarmenn bera eitt lík í land*

*Mynd: Reuters*

**Meiri enn 130 fólk vóru við ferðamannabátinum, sum holvdist og sakk úti fyri strondini í Bahrain. Men báturin hevði bara loyvi at hava 100 fólk**

VANLUKKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Báturin hevði loyvi at sigla við 100 ferðafólkum, men felagið, sum leigaði bátin til útferðina, kravdi, at nógv fleiri skuldu umborð.

Tað var frágreiðingin hjá reiðarínum, eftir at ein ferðamannabátur úr Bahrain holvdist og sakk ein lítlan fjórðing úr landi í gjárkvøldið. Tað var av besta veðri, tá vanlukkan hendi, og talsmaðurin hjá reiðarínum helt, at báturin kann vera farin runt, tí ov nógv fólk hava verið í øðrum borðinum.

Innanríkisráðið í Bahrain segði í dag, at vanlukkan kravdi minst 57 mannalív, og at tey flestu vóru útlendingar. Eftir ferðafólkalistanum vóru millum annað 25 bretar, 20 filipsoyingar, 10 suðurafrikanar og 10 egyptar við ferjuni.

Sambært innanríkisráðnum vóru 63 fólk bjargað á lívi fyrrapartin, og fleiri skip og kavarar leitaðu saman við amerikonskum hernaðartyrlum eftir teimum, sum ikki vóru komin afturíaftur.

# Tað er verri í Uganda enn í Irak

**Har norðuri í Uganda doyggja tríggjar ferðir so nógv fólk sum í Irak, og 25.000 børn eru burturflutt og verða brúkt sum hermenn**

UGANDA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Støðan har norðuri í Uganda er ein av teimum ringastu vanlukkunum í heiminum. Tað er niðurstøðan í einari nýggjari frágreiðing, sum 50 felagsskapir almannakunngjørdu í gjár.

Tá Yuweri Musuveni, forseti, kom til valdið fyri júst tjúgu árum síðani eftir eitt kvett, brast kríggj á har norðuri í landinum, og bardagarnir ímillum stjórnarherin og uppreistrarmenninar í Harrans Mótstøðuheri halda fram. ST metir, at umleið tvær milliónir fólk eru rikin frá húsi og heimi, og umleið 25.000 børn eru burturflutt, so tey kunnu virka sum hermenn ella hjálparfólk hjká Guðs Mótstøðuheri.

Harafturat hava ein fjórðingur av øllum børnunum í Norðuruganda mist annað ella bæði foreldrini í kríggnum. Teir 50 felagsskapirnir siga, at Harrans Mótstøðuherur útvegar sær hermenn við at burturflyta kvinnur og børn, men stjórnarhermenninir eru heldur ikki Guðs bestu børn.

Tey seinastu trý árini hevur kríggið har norðuri í Uganda kravt tríggjar ferðir fleiri mannalív enn kríggið í Irak, og hildið verður, at partarnir hava brúkt einar 10 milliardir krónur til vápn og annað í sambandi við kríggið.

Norðmaðurin Jan Egeland, sum stendur á odda fyri neyðhjálpararbeiðinum hjá ST, kom til Uganda í dag at kanna viðurskiftini. Sjálvur hevur hann skotið upp at seta eina serfrøðinganevnd at kanna virksemið hjá Harrans Mótstøðuheri, sum er kendur fyri sína sera harðrendu og ómenniskjaligu framferð.

Millum felagsskapirnar, sum hava skrivað frágreiðingina um støðuna har norðuri í Uganda, eru Oxfam, Care, Flóttafólkahjálpin og Red Barnet.

## Hevði mist lívið av trúnni

Afghanin Abdul Rahman, sum valdi at taka við kristnari trúgv, vil vera við, at hevði hann ikki sloppið úr heimlandinum, hevði trúarskiftið kostað honum lívið. Abdul Rahman var ákærdur fyri at hava vent islamsku trúnni bakið, men eftir áheitan frá pávanum og ST varð hann latin leysur.

Mikunáttina varð hann smuglaður út úr Afghanistan til Italia, har hann býr á einum loyniligum staði. Í gjár fingu italsk tíðindafólk høvi at tosa við hann, og tá nýtti Abdul Rahman høvi til at takka pávanum fyri hjálpina. Hann var heldur ikki í iva um, at pávin og ST høvdu bjargað lívi hansara.

– Eg eri vísur í, at teir høvdu gjørt av við meg. Ert tú annað enn muslimur í einum muslimskum landi, verður tú tikin av døgum, segði hann við tey italsku tíðindafólkini.

Benadikt pávi XVI sendi tann 23. mars afghanska forsetanum, Hamid Karzai, eitt bræv við áheitan um at sleppa rættarmálinum ímóti Abdul Rahman. Tað sama gjørdi ST, og italska stjórnin hevur játtað honum friðskjól í Italia.

## Stúra fyri jarðskjálvta í Kalifornia

70 prosent av fólkinum í Kalifornia vænta, at ein harður jarðskjálvti fer at raka statin, men bara 20 prosent halda, at tey eru nóg væl fyrireikað til ein slíkan skjálvta.

Eingin veit, nær ein møguligur harður jarðskjálvti verður í Kalifornia, men tey flestu vænta ein harðan skjálvta um ikki so langa tíð. Umleið helmingurin av fólkinum halda, at myndugleikarnir eru nóg væl fyrireikaðir, so teir verða førir fyri at veita ta neyðugu hjálpina.

Hinvegin halda nógv tey flestu, at brýr og stórir bygningar í Kalifornia tola ein harðan jarðskjálvta, tí tey hava álit á teimum krøvunum, sum myndugleikarnir seta til slíka bygging, skrivar AP.

## Nógvar ódnir aftur í ár

Amerikanski veðurfrøðingurin Max Mansfield væntar, at nógvir tropiskir stormar fara at herja Karibiska Havið í ár, men tað kortini ikki verður so ringt sum í fjør, heldur hann. Í fjør vóru ikki færri enn 27 tropiskir stormar. Sjey teirra mentu seg til tropiskar ódnir, og av teimum raktu fýra amerikanska meginlandið, har tær gjørdu ovurstóran skaða.

Max Mansfield sigur, at síðani 1995 eru ódnirnar í karibiska økinum vórðnar fleiri í tali, og hann og aðrir granskarar eru á einum máli um, at tað er tann heiti sjógvurin, sum er orsøkin. Teir halda, at eitt tíðarskeið við nógvum ódnum kann vara ímillum fimm og 15 ár, og tí kann roknast við nógvum ódnum nøkur ár afturat.

Amerikanskir granskarar kanna í løtuni ódnina ”Wilma”, sum gjørdi um seg í fjør. Tað serliga við henni var, at hon menti seg frá einum vanligum tropiskum stormi til eina harða ódn eftir bara 24 tímum.

Árstíðin við tropiskum stormum og ódnum byrjar tann 1. juni, og longu nú er avgjørt, at tann fyrsti stormurin skal eita ”Alberto”.

## Skipa stórt fríhandilsøki

India, Brasil og Suðurafrika arbeiða við einari ætlan um ein fríhandilssáttmála, sum skal umfata lond í trimum heimspørtum.

Brasilski uttanríkisráðharrin, Celso Amorim, sigur, at møguleikarnir fyri búskaparligum framburði í Suðuramerikia, Asia og Afrika er stórur. Hann sigur, at tey trý londini eru næstan liðug við samráðingarnar um ein fríhandilssáttmála, sum ætlandi eisini skal umfata lond sum Argentina, Paraguay, Uruguay, Botswana, Lesotho, Namibia og Swaziland.

Tað eru uttanríkisráðharrarnir í Brasil, India og Suðurafrika, sum arbeiða við sáttmálanum, og næsta samráðingarumfar verður í september, skrivar AP.